# Nýggjur og størri Twingo






Ein av nógvu nýggjheitunum frá Renault í ár er Twingo, ið avloysir forgangaran við sama navni, sum hevur verið gjørdur síðan 1993.

Twingo er tann minsti Renault og hevur verið fyrimyndin hjá fleiri øðrum minibilum.

Eins og forgangarin verður hesin einans gjørdur við trimum hurðum. Nýggi Twingo er ein størri, meira modernaður og rúmligari bilur enn forgangarin.

Kabinan er sermerkt við t.d. talgildum speedometri og øðrum instrumentum í miðjuni á instrumentborðinum, meðan snúningsteljarin er framman fyri bilføraran. Clio fæst við 1,2 litra bensinmotori við 76 hk og 1,5 litra DCI dieselmotori við 64 hk.

**Prísur úr kr. 129.800**

# Renault Kangoo til alla familjuna






Renault eru komnir á marknaðin við einum heilt nýggjum Kangoo. Meðan tann fyrri Kangoo meira var ein vørubilur við síðurútum er hesin nýggi ein ektaður MPV við t.d. dragihurðum í báðum síðum.

Nýggi Kangoo er størri og rúmligari enn forgangarin. Ein familjubilur burturav til fimm ferðandi við liðiligari innrætting og stórum viðførisrúmi, sum er 660 litrar. Ein barnavognur passar inn í viðførisrúmið uttan at skula leggjast saman.

Bilurin er innrættaður soleiðis at baksetrini og høgra forsetur kunnu leggjast niður, soleiðis at viðførisrúmið verður eitt rættiliga stórt vørurúm.

Hesin Kangoo er størri enn forgangarin og er bygdur yvir sama plattform sum Renault Scénic. Koyrieginleikar og komfortur eru sum á fronskum bilum, tá teir eru best.

Kangoo fæst við 1,6 bensinmotori við 105 hk og við 1,5 dieselmotori við 85 hk.

**Prísur úr kr. 211.000**

# Koleos – smartur SUV frá Renault






Renault eru nú við í SUV kappingini í miðalklassanum við Renault Koleos, sum er ein smartur SUV við fronskum designi, japanskum teknikki og er framleiddur í Suðurkorea.

Koleos er rúmligur, væl útgjørdur og innrættingin er sera liðilig. Baklúkan er tvídeild, og baksetrini er løtt at leggja niður og við baksetrini eru flúgvaraborð.

Koleos er sum ein persónbilur at koyra og er lættur at umgangast í allar mátar. Ein heppin planding av japanskum kvaliteti og fronskum koyrieginleikum. Tekniskt er Koleos sami bilur sum Nissan X-Trail.

Koleos fæst við tveimum ymiskum 2.0 dCi dieselmotorum við ávikavist 150 hk (320 Nm) og 175 hk (340 Nm). Bensinmotorurin er ein 2,5 litra við 170 hk (226Nm). Koleos hevur eina framkomna 4x4 skipan.

Koleos er sera væl útgjørdur og hevur t.d. automatiskt, 2-zone klimaskipan, el-síðuspegl, parkeringssensorar aftan og framman, regnsensor, og eins og Renault Laguna hevur hesin smart card og startar uttan lykil.

**Prísur úr kr. 372.000**